Kappingin er minni enn hon plagar at vera

Argjadreingir eru so mikið stinnir, at FM kappingin tykist skula gerast væl minni, enn hon plagar at vera ímillum dreingjamanningarnar

5-MANNAFØR DREINGIR

Jóannes Hansen

Blikur av Argjum legði seg tíðliga í róðrinum á odda, og hann helt allan vegin á mál

Mynd: Álvur Haraldsen

Dreingjakappingin hevur ofta verið tann tættasta og harvið tann mest spennandi. Úrslitini í tveimum teimum seinastu kappingunum hava greitt bent á, at tað neyvan verður soleiðis í ár. Nýggi báturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, Spógvin, var fremstur á Norðoyastevnu. Síðani hevur Blikur vunnið tvær ferðir, og sigurin hjá argjadreingjum var so mikið sannførandi leygardagin á Sundalagsstevnuni, at argjadreingir mugu finna seg í at verða roknaðir at vera greiðir favorittar at vinna FM heitið, sum dreingirnir umborð á Sílinum hjá Havnar Róðrarfelag hava vunnið tvey tey seinastu árini.

Leygardagin vóru dreingjamanningarnar í meiri enn ein tíma í bátunum, áðrenn teir fingu høvi at kappast. Tað eru alt annað enn optimalar umstøður.

Tá ið startskotið var latið av, var tað mest sum beinanvegin, at Blikur fleyg frá øllum hinum. Á fyrstu tvey hundrað metrunum vann hann tað mesta av einari bátslongd frá kappingarneytunum, og so var ongantíð nakað ivamál um, hvør fór at vinna hesa kappingina.

Umframt Runavík og Argir so hava Vestmanna og Havnar Róðrarfelag ofta átt stinnastu dreingjamanningarnar. Hesa ferð lá tað inum. Men tað steðgaði fullkomuliga upp hjá teimum í nýggja bátinum hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ, og Spógvin var ikki fremri enn nummar sjey á málinum. Harvið eydnaðist honum ikki at fáa stig í FM kappingini.

Klaksvíksdreingir og tvørádreingir vóru eisini væl fyri hjá vestmannadreingjum umborð á Havfrúnni. Teir vóru framvið beinanvegin, og teir vóru drúgvastir í rættuliga tættu kappingini um næstfremsta plássið.

Klaksvíksdreingir og tvørádreingir vóru eisini væl við. Tað kundi kanska bent á, at gamlar kappróðrarbygdir sum Tvøryri og Klaksvík eiga gott í væntu. Klaksvíkingar kappaðust við tveimum manningum. Hesa ferð endaði Tekla á triðja plássinum hálva aðru bátslongd aftanfyri Havfrúnna, sum var eina bátslongd aftanfyri Blik.

Firvaldur gjørdist nummar fýra. Munurin frá Teklu og aftur til hansara var sera lítil, og munurin frá Firvaldi og aftur til hin bátin úr Klaksvík, Fípuna Føgru, var ikki meiri enn ein lítil bátslongd.

Drekin endaði á sætta plássinum, og Sílið gjørdist nummar átta og aftanfyri Spógvan.

Eisini í hesi kappingini vóru vertirnir rættuliga blíðir. Báran var aftast.

Blikur hevur ikki vunnið FM í dreingjakappingini síðani í 1985, 1988 og í 1989. Tað eru einastu ferðirnar, at argjadreingir hava verið meistarar - higartil. Avrikini og úrtøkan tvær tær seinastu ferðirnar kundu bent á, at tað fer at eydnast Bliki at vinna fyrsta FM heitið í fimtan ár. Tað eru framvegis fýra FM kappingar eftir, og dreingirnir umborð á Bliki mugu finna seg í, at teir verða mettir at vera favorittar, tá ið tað leygardagin fer at verða kappast á Jóansøku suðuri í Vági.

5-mannafør, dreingir

1 Blikur	05.28.93
2 Havfrúgvin	05.31.40
3 Tekla	05.35.04
4 Fípan Fagra	
5 Firvaldur	
6 Drekin	05.38.24
7 Spógvin	05.41.72
8 Sílið	05.42.96
9 Kollur	05.45.45
10 Tjaldrið	05.46.93
11 Royndin Fríða	05.47.97
12 Svanur	06.05.23
13 Báran	06.13.75

Tættasti endaspurturin av øllum

Sundabáturin var um reppið at fáa fatur í Jarnbardi, sum fyri aðru ferð á rað var drúgvastur og nú er best fyri í tættari FM kapping

6-MANNAFØR MENN

Jóannes Hansen

: Menninir umborð á Jarnbardi vunnu leygardagin annan sigurin á rað í FM-kappingini

Mynd: Álvur Haraldsen

FM kappingin millum 6-mannaførini er rættuliga spennandi. Triggir bátar eru rættuliga væl við í kappingini. Trý stig eru frá Jarnbardi á fremsta plássinum og aftur til Gongurólv, sum er nummar trý. Jarnbardur hevur seytjan stig, Sundabáturin hevur sekstan stig, og nýggi Gongurólvur hevur fjúrtan stig.

Á Hvalvík var endaspurturin í hesum róðrinum tann mest spennandi. Á fyrstu fimm hundrað metrunum skiftust bátarnir um at bjóða seg fram. Sundabáturin, sum ikki fekk eins dyggan start, sum teir á Jarnbardi og Gongurólvi, var eina løtu fremstur. Hann var ein skut frammanfyri Gongurólv.

Tá ið bátarnir vóru farnir um túsund metra málið, legði Jarnbardur seg á fremsta plássið, sum teir vunnu á Skálafjørðinum. Jarnbardur fór eitt sindur frá kappingarneytunum, og ta einu løtuna tóktist tað sum um, at teir skuldu vinna trivaligan sigur. Skuturin gjørdist til hálva bátslongd, og hálva bátslongdin dragnaði eina løtu til trý kvart bátslongd. Men so stóð stilt, og á síðstu gott og væl eitt hundrað metrunum tók tað orduliga at tødna aftur.

Orsøkin til ovurstóra spenningin í endaspurtinum var tann, at Sundabáturin rættuliga fann stevið aftur. Eftir at hálvt málið gott og væl var rógvið, tók Sundabáturin Gongurólv, og so settu teir í Norðdepli og Hvannasundi eftir Jarnbardi. Munurin minkaði og minkaði. Fyri hvørt takið í endaspurtinum kom Sundabáturin longri fram á Jarnbard, men teir megnaðu kortini ikki at taka hann. Tá ið teir fóru um málstrikuna, var munurin ein stórur skutur ella ein heilt lítil hálv bátslongd.

Harvið høvdu fesku kapprógvararnir umborð á Jarnbardi, sum higartil so meistarliga væl hava dugað at undirspælt sína styrki og síni evni, enn eina ferð vunnið.

Nú eru teir fremstir í FM kappingini. Men gongdin á Hvalvík legði upp til sera spennandi kapping í Vági næsta leygardag. Og tað kann væl hugsast, at kappingin ikki bara fer at standa millum Jarnbard og Sundabátin. Gongurólvur var á Hvalvík so væl við, sum hann ikki hevur verið undanfarnu ferðirnar. Á øllum teininum var hann við til at seta dám á, og á málinum var hann bara eina stóra hálva bátslongd aftanfyri vinnarabátin og ein skut frá Sundabátinum, sum var næstfremstur.

Tíggju bátar vóru við í róðrinum. Lómur av Argjum var stinnari í lutfalsliga tættari kapping um fjórða plássið við Stráluna. Strandingar lógu væl fyri í startinum, men tað kiksaði heilt hjá teimum.

Sandingar, sum eru heilt nýggir í kappróðrinum, fingu besta úrslitið higartil. Teir endaðu á áttanda plássinum og vóru harvið frammanfyri bæði Hósvíking og Hvessing, sum vóru so mikið gestablíðir á Sundalagsstevnuni, at teir lótu allar hinar koma á mál, áðrenn teir fóru um málstrikuna.

Tað hava verið betri tíðir í kappróðrinum í Sundalagnum, enn tað eru nú. Í kappróðrinum gongur tað hjá smáu feløgunum upp og niður. Úr dalinum er tað bara ein vegur, og tað er upp aftur á tindin. Áhugin í Sundalagnum er stórur fyri kappróðri, og tað er ivaleyst bara ein spurningur um tíð, nær bátar úr tí økinum aftur fara at verða at síggjast millum teir fremstu. Menninir umborð á Hvessingi vunnu FM í 1999. Hósvíkingur hevur ikki verið meistari síðani í 1987, tá ið teir vunnu triðja FM heitið á rað.

6-mannafør, menn

1 Jarnbardur	08.15.19
2 Sundabáturin	08.16.06
3 Gongurólvur	08.17.12
4 Lómur	08.25.07
5 Strálan	08.27.11
6 Sølmundur	08.31.08
7 Víkingur	08.31.22
8 Sandingur	08.42.24
9 Hósvíkingur	08.45.07
10 Hvessingur	08.49.17

Argjagentur og so allar hinar

Genturnar umborð á Bliki vunnu enn ein sannførandi sigur, og hesaferð vóru tær heilar tvær bátslongdir framman fyri nummar tvey, ið var Firvaldur av Tvøroyri

Mynd: Álvur Haraldsen

Genturnar umborð á Bliki stóðu heldur ikki á Sundalagsstevnuni aftanfyri hinar vinnararnar hjá Argja Róðrarfelag

5-MANNAFØR GENTUR

Jóannes Hansen

Í størstu kappingini av øllum á Sundalagsstevnuni á Hvalvík leygardagin var eingin ivi. Genturnar umborð á Bliki hjá Argja Róðrarfelag vóru klárt tær stinnastu. Á málinum vóru tær meiri enn eina bátslongd frammanfyri næstu kappingarneytarnar.

Blikur var millum teir fremstu longu í startspurtinum. Og tað var skjótt, at Blikur rann eina bátslongd frá hinum. Fleiri kappaðust um næstu plaseringarnar. Av teimum var tað Firvaldur av Tvøroyri, sum var bestur. Hann var klárt nummar tvey. Næstan eins nógv frammanfyri teir næstu, sum Blikur var frammanfyri Firvald.

Í kappingini um næstu plássini var tað óvanliga tætt. Frá Havfrúnni, sum endaði sum nummar trý, og aftur til Fípuna Føgru, sum gjørdist nummar seks, var munurin eitt stórt sekund ella minni enn ein hálv bátslongd.

Sílið, sum vann á Norðoyastevnu, var hesa ferð nummar fýra. Sílið er framvegis næstfremst í FM kappingini. Men fjarstøðan fram til Blik øktist til fýra stig. Firvaldur og Havfrúgvin eru eisini við í kappingini um heiðursmerkini og kanska eisini meistaraskapin. Men tað er eingin ivi um, at Blikur, sum hevur verið so sera sannførandi á Skálafjørðinum og í Sundalagnum, er best fyri undan fjórðu FM kappingini, sum verður í Vági nú leygardagin.

Genturnar umborð á Bliki hava áður vunnið FM, men nú er tað langt síðani. Blikur hevur áður vunnið FM tvær ferðir. Fyrra ferðin var í 1984, og seinna ferðin var í 1986.

Leygardagin eydnaðist tað Frúnni úr Miðvági at standa seg betri, enn tær hava gjørt í hinum báðum kappingunum. Í sera tøttu kappingini millum bátarnar, sum komu á mál aftaná vinnarabátin av Argjum og Firvald, gjørdist Frúgvin nummar fimm. Harvið fekk Frúgvin tvífalt so nógv FM stig, sum tær høvdu frammanundan.

5-mannafør, gentur

1 Blikur	05.46.21
2 Firvaldur	05.50.21
3 Havfrúgvin	05.53.13
4 Sílið	05.53.17
5 Frúgvin	05.53.24
6 Fípan Fagra	05.54.18
7 Junkarin	05.57.05
8 Tjaldrið	06.00.00
9 Drekin	06.01.10
10 Ørnin	06.04.04
11 Tekla	06.06.17
12 Spógvin	06.08.10
13 Falkur	06.14.15
14 Hvassin	06.28.06

Fram á botninum

Í fyrstu atløgu hjálpti tað einki, at Ion Geolgau nú hevur fingið hjálparvenjara, sum bara skal hugsa um at stuðla honum við besta Fram liðnum

ÍSLAND

Jóannes Hansen

Tað gongur ikki væl hjá Fram í íslendsku landskappingini. Eftir hampuliga góða byrjan hevur felagið, sum Ion Geolgau er venjari hjá, og sum hevur Hans Fróða Hansen og Fróða Benjaminsen millum spælararnar, havt tað torført, og soleiðis er tað framvegis.

Mánakvøldið var fyrsti dysturin í sjeynda umfarinum í íslendsku landskappingini á skránni. Reykjavíkar felagið Fram vitjaði KR, sum eisini er úr Reykjavík. KR vann 3-0, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri við einum máli. Talan var um brotsspark, sum teir skoraðu uppá, tá ið tað restaðu seks minuttir av 1. hálvleiki.

Fram ímóti dystarenda fekk KR tvey mál afturat. Í kvøld verða fleiri aðrir dystir í sjeynda umfarinum. Eitt nú skulu Julian Johnsson og ÍA spæla á útivølli í Keflavík.

Eftir trivaliga sigurin á Fram er KR næstovast. KR hevur verið íslendskur meistari tvey tey seinastu árini. Fram er næstaftast. Burturúr sjey landskapingardystum hava teir fingið fimm stig.

At tað ikki er heilt gott í Fram sæst eitt nú aftur í, at felagið undan vikuskiftinum gjørdi av, at teir skuldu hava nýggjan mann at taka sær av næstbesta liðnum. Frammanundan hevði hjálparvenjarin hjá Ion Geolgau eisini havt ábyrgdina av næstbesta liðnum. Nú skal hann bara savna seg um at hjálpa til við besta liðnum.

Upprunaliga var ásett, at dysturin millum KR og Fram skuldi vera klokkan 19.15 mánakvøldið. Men eisini íslendingar fylgja við í EM endaspælinum í Portugal. Orsaka av spennandi dystunum millum Frakland og Sveis og Kroatia og Ongland gjørdi íslendska fótbóltssambandið, KSÍ, av, at dysturin millum KR og Fram skuldi útsetast til klokkan níggju. Í góðveðrinum seint á kvøldi longsta dag royndi føroyska felagið seg á útivølli ímóti KR, og tað hilnaðist ikki væl.

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	j	t	mál	v mál	+/-	stig
1 Fylkir	6	4	2	0	9	3	6	14
2 KR	7	3	2	2	9	7	2	11
3 Keflavík	6	3	1	2	7	9	-2	10
4 ÍBV	6	2	3	1	10	6	4	9
5 ÍA	6	2	3	1	7	5	2	9
6 FH	6	2	3	1	7	6	1	9
7 Grindavík	6	1	4	1	5	6	-1	7
8 KA	6	2	1	3	5	6	-1	7
9 Fram	7	1	2	4	7	11	-4	5
10 Víkingur R	6	0	1	5	3	10	-7	1

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

FM-STØÐAN 2004

5-mannafør dreingir

1. Blikur	19 stig
1. Spógvin	12 stig
3. Havfrúgvin	12 stig
4. Fípan Fagra	10 stig
5. Tekla	7 stig

5-mannafør gentir

1. Blikur	18 stig
2. Sílið	14 stig
3. Firvaldur	13 stig

6-mannafør kvinnur

1. Jarnbardur	21 stig
2. Páll Fangi	15 stig
3. Lómur	12 stig

6-mannafør menn

1. Jarnbardur	17 stig
2. Sundabáturin	16 stig
3. Gongurólvur	14 stig

8-mannafør

1. Argjabáturin	21 stig
2. Kvívíkingur	14 stig
3. Nevið Reyða	12 stig

10-mannafør

1. Havnarbáturin	19 stig
2. Nólsoyingurin	16 stig
3. Eysturoyingur	9 stig